# Íløguklubbi fyri kvinnur

**Eftir eitt sera væl vitjað temakvøld um “Kvinnur og Pengar” í Føroya Sparikassa er ein íløguklubbi fyri kvinnur stovnaður. Kapping er útskrivað um, hvussu klubbin skal eita**



*„Kvinnur snýta seg sjálvar fyri meirvinningin, ið kann fáast burtur úr uppsparing og pensjón“, greiðir Eva S. Nolsøe frá. Hon er pensjóns- og íløguráðgevi í Sparikassanum*

## TEMAKVØLD

Áhugin fyri íløgum er vaksandi í Føroyum, og kvinnurnar eru einki undantak í so máta.

Hetta prógvaði Føroya Sparikassi á einum temakvøldi um “Kvinnur og Pengar”, sum var hóskvøldið í høvuðssæti Sparikassans í Havn. Ikki færri enn 160 kvinnur vóru við á temakvøldinum, sum man vera hitt fyrsta av sínum slag í Føroyum.

“Hóast kvinnur liva longri enn menn, og tí hava tørv á miðvísari uppsparing og góðari pensjón, so vísa hagtøl, at menn spara meira upp og hava betri pensjónir enn kvinnur. Nógvar kvinnur snýta seg sjálvar fyri meirvinningin, sum kann fáast burtur úr uppsparing og pensjón, og tað var meginorsøkin til, at vit skipaðu fyri hesum temakvøldinum”, siga Margareth D. Djurhuus og Eva Nolsøe, pensjóns- og íløguráðgevar í Føroya Sparikassa, ið vóru millum fyriskipararnar.

Í stuttum var temakvøldið eitt bland av álvara og gaman. Ráðgevar úr Sparikassanum kunnaðu um pensjónir, íløgur og onnur fíggjarviðurskifti. Løgfrøðingarnir, Anna Dam og Gunn Ellefsen, komu við nøkrum løgfrøðiligum sjónarmiðum um, hvussu kvinnur kunnu tryggja seg fíggjarliga. Skemtið, ið snúi seg um nýmótans kvinnuna, stóðu Sjúrður Skaale og Bárður Persson fyri.

Fyri at geva kvinnunum møguleika at royna, hvussu pengarnir kunnu sendast út at arbeiða, hevur Føroya Sparikassi stovna ein íløguklubba fyri kvinnur. Enn hevur klubbin ikki fingið navn, og á heimasíðuni www.sparikassin.fo er ein navnakapping, har øll kunnu vera við. Vinningurin er 10 partabrøv í Sparikassanum.

Seinastu mánaðirnar hevur Sparikassin skipað fyri einari røð av temafundum, og fundurin um kvinnur og pengar var hin nýggjasti í røðini.



*Tilsamans 160 kvinnur vóru við til „Kvinnur og Pengar“ í Sparikassanum. Her er tað journalisturin Bjørt Samuelsen, ið spyr nærri.*



*Hugurin at spyrja um pensjónir og íløgur var hampiliga stórur, og gott orðaskifti var kvinnukvøldið í Sparikassanum*



*Nógv tøl og tekniskar upplýsingar vórðu latnar áhoyrarunum á ein greiðan og skiljandi hátt. Pensjóns- og íløgurágevarnir, Margareth D. Djurhuus (h.m.) og Eva S. Nolsøe, á pallinum.*



*Karikaturin av business-kvinnuni var eisini við, og sjónleikarin Bárður Persson stóð aftan fyri hesa kvinnuna*



*Nýmótans kvinnan arbeiðir í fíggjarheiminum og maðurin er heimaarbeiðandi. Tað var grundarlagið undir skemtinum hjá Bárði Persson (v.m.) og Sjúrði Skaale*